# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Tá alt er standard




*Søldfiringurin Pól Rasmussen, sum er búsitandi á oynni Bømlo í Norra, eigur hendan Lexus LS430*

**Lexus halda upp á at teir við nýggja LS 460 hava gjørt heimsins besta bil, sum varð kosin World Car of the Year 2007. Bilurin, sum vit royndarkoyra í dag er forgangarin hjá LS460, Lexus LS 430**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hóast nokk so nógvir Lexus bilar eru í landinum, hevur enn eingin ognað sær ein av teimum størstu Lexus LS. Orsøkin er helst, at ein slíkur bilur kostar millum eina og hálva millión her hjá okkum.

Vit kundu tí ikki standa fyri freistingini, tá søldfiringurin Pól Rasmussen, sum er búsitandi á oynni Bømlo í Norra, ein dagin kom inn á golvið og bjóðaði okkum ein royndatúr við sínum Lexus LS430 árgang 2001. Hann keypti bilin í oktober í fjør fyri umleið eina hálva millión krónur. Sum nýggjur kostaði hann um 1, 2 milliónir krónur.

Tey, sum vanliga lesa útlendsk bilbløð, hava lagt til merkis, at tá ein av hesum stóru Lexus bilunum verður royndarkoyrdur, er tað altíð ein serlig uppliving fyri motorjournalistin. Tað er sum um at teir sveima á ljósareyðum skýggjum, og eingin endi er á, hvussu teir lovprísa bilinum.

Satt at siga so var tað ein serlig uppliving at koyra bilin. Hóast talan er um ein stóran bil við stórum motori, er hann sera lættur at koyra runt við í ferðsluni.

Tá vit komu til bilin við billyklunum í lummanum, læt bilurin sjálvur upp, og bilførarin kundi seta seg í førarasetrið, sum sjálvt stillar seg inn. Síðan var klárt at trýsta á knøttin, so 4.3 litra V8 motorurin við næstan 300 hk fór í gongd, hóast tað næstan ikki hoyrdist ella merktist inni í luksuskendu leðurkabinuni.

Faktiskt er eingin listi yvir eykaútgerð til ein slíkan bil, tá alt er standard. Vit kunnu t.d. nevna at hann hevur luftfjaðraskipan (við hæddarregulering), parkeringssensorar framman og aftan, el-setur framman við memory og el-setur aftan, sum kunnu stillast aftur og fram. Setrini hava innbygdar vibratorar, sum massera ryggin undir koyring.

Um ein hurð t.d. ikki er ordilga afturlatin, finnur bilurin út av tí og syrgir fyri at allar hurðarnar eru afturlatnar undir koyring.

At Lexus hava vunnið sær eitt pláss millum heimsins fremstu bilar er ikki so ringt at skilja eftir ein royndartúr við Lexus LS430.




*Lexus LS430 er ein stórur luksusbilur*




*4.3 litra V8 motorurin við 284 hk hoyrist næstan ikki inni í kabinuni*



*Baksetrini kunnu stillast aftur og fram hvør sær elektriskt*



*Lexus LS430 innan við leður og nøtutræ og allari útgerð*

## Lexus LS 430

| | |
|---|---|
| **Motorurin** | 4,3 litra diesel 284 hk |
| **Snúningsmoment** | 417 Nm v.3.500 snún. |
| **0-100 km/t** | 6,7 sek |
| **Bensinnnýtsla** | 8,3 km/l (blandað koyring) |
| **Dekkstødd** | 225/55-17 |

**Stødd og vekt**

| | |
|---|---|
| **Longd** | 500,5 cm |
| **Breidd** | 183,0 cm |
| **Hædd** | 147,0 cm |
| **Eginvekt** | 1.830 kg |
| **Viðførisrúm** | 552 litrar |